*Form. Tjóðveldisfloksins:*

# Hergeir má hava misskilt støðuna

*– Málið um oljuhavn í Suðuroy er ongantíð samtykt í Tjóðveldisflokkinum, sigur Heini O. Heinesen*



*Heini O. Heinesen, formaður Tjóðveldsifloksins, sigur, at tað var eitt mistak av Hergeir Nielsen at boða Suðuroyar Oljuvinnuráð, at tjóðveldisflokkurin hevur einmælt samtykt, at oljuhavn skal vera í Suðuroynni. Tí tað hevur flokkurin ongantíð formliga viðgjørt og tíansheldur ikki samtykt, sigur hann*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Brævið frá Suðuroyar Oljuvinnuráð er ongantíð formliga viðgjørt í tjóðveldisflokkinum.

Tað sigur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins.

Tað var í november í fjør, at Suðuroyar oljuvinnuráð spurdi teir politisku flokkarnar, hvørja støðu teir tóku til at oljuhavn verður gjørd í Suðuroynni.

Ráðið fekk svar frá Hergeir Nielsen, sum segði, at tjóðveldisflokkurin hevði viðgjørt málið og hevði einmælt samtykt, at oljuhavn skuldi leggjast í Suðuroynni.

Men hetta má vera ein misskiljing, sigur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins.

Hann sigur, at brævið frá Suðuroyar Oljuvinnuráð er ongantíð formliga viðgjørt í tjóðveldisflokkinum.

– Sostatt má tað vera ein misskiljing, tá ið Hergeir Nielsen hevur boðað oljuráðnum frá, at tjóðveldisflokkurin hevur einmælt samtykt, at oljuhavn skal vera í Suðuroy.

Hann sigur hinvegin, at málið um oljuhavnir hevur mangan verið til umrøðu í tjóðveldisflokkinum.

–Á tí eina fundinum spurdi Hergeir Nielsen um nakar hevði nakað ímóti at oljuhavnin verður løgd í Suðuroy.

– Og tað var tað ongin í tingmanningini sum hevði.

Heini O. Heinesen sigur, at hann uppfataði hetta ikki sum eina samtykt.

– Men Hergeir Nielsen má so hava uppfatað tað øðrvísi enn tingmanningin annars og tí hevur hann givið Suðuroyar Oljuvinnuráð tey boð, at flokkurin hevur einmælt samtykt, at oljuhavn skuldi vera í Suðuroy, sigur Heini O. Heinesen.

Hergeir Nielsen hevur sjálvur skrivað undir brævið til Suðuroyar Oljuvinnuráð, so tað kann ikki vera komið frá flokkinum.

– At halda tað, er at leggja Hergeir Nielsen ein myndugleika til, sum hann ikki hevur.

– Men at hann vil hava oljuvinnuna til Suðuroynna er púra náttúrligt og tað er eisini í fullum samsvari í ætlanina hjá samgonguni um økismenning.

– Men sjálvandi kann tað koma skeivt fyri viðhvørt.

– Og tá ið samgongan ikki fæst at standa saman í einum máli sum hesum, kunnu vit skjóta ein hvítan píl eftir økismenning.

– Heini O. Heinesen sigur, at seinni skuldi tjóðveldisflokkurin taka málið til viðgerðar, men tá boðaði Hergeir Nielsen frá, at tað var óneyðugt, tí tað var longu avgjørt. Og so datt málið burtur aftur.

Heini O. Heinesen leggur tó afturat, at tað er rætt, sum Hergeir Nielsen eisini boðar Suðuroyar oljuvinnuráð frá, at landsstýrismenn floksins fingu til uppgávu at virka fyri í landsstýrinum, at tað skuldi áleggjast oljufeløgunum, at reka sítt virksemi út frá Suðuroynni.

– Men tað miseydnaðist og flestu flokslimirnir valdu tískil at vera trúgvir mótvegis samgonguni og tí atkvøddu teir ikki fyri oljuhavnini í Suðuroynni.

*Er tað so ikki okkurt álvarsligt brek í samskiftinum innanfloks?*

– Tað er ikki sagt fyri tað, tí eftir mínum tykki má talan vera um eina misskiljing og tað kann jú altíð koma fyri.

### Eitt mistak

Annars heldur formaður Tjóðveldisfloksins, at tað var eitt mistak av Suðuroyar Oljuvinnuráð at biðja flokkarnar um teirra støðu til oljuhavn í Suðuroynni.

– Tað kann sjálvsagt verða trupult hjá landsumfatandi flokkum at taka eina slíka støðu, tí so koma nógvir flokslimir at ganga ímóti sínum egna valdømi.

– Tað er bara ein flokkur, sum kann koma til eina einmælta niðurstøðu í hesum málinum, og tað er flokkurin, sum hevur meginpartin av tingfólkunum úr Suðuroynni, altso javnaðarflokkurin.

– Oljuráðið í Suðuroy skuldi heldur havt umhugsað at lagt málið fyri tað sokallaður og nógv umrøddu útjaðarasamgonguna í eini roynd at fingið allar tingmenn úr útjaðaranum at staðið saman um oljuvinnuna, sigur Heini O. Heinesen.

– Men Oljuráðið gjørdi málið politiskt og tað ivist eg í, um teir vinna nakað við, sigur formaður tjóðveldisfloksins at enda.

Les meir á síðu 4

*Suðuroyar Tjóðveldissfelag setir flokkinum krøv:*

# Stuðulin til samgonguna og Hergeir Nielsen er nú í vanda

*Tjóðveldisflokkurin hevur viðgjørt málið um oljuhavn í Suðuroy sera jánkasliga, sigur Suðuroyar Tjóðveldisfelag*

ÁKI BERTHOLDSEN

Suðuroyar Tjóðveldisfelag er nú av álvara farið at leggja trýst á tingmannin hjá sær, Hergeir Nielsen, og á samgonguna sum heild.

Í einum brævi til Tjóðveldisflokkin, hóttir felagið beinleiðis við at taka stuðulin til bæði Hergeir Nielsen og samgonguna aftur, um ávís krøv ikki vera gingin á møti.

Tað eru serliga í tveimum málum, at nevndin í Suðuroyar Tjóðveldisfelag heldur, at samgongan hevur gingið suðuroyingum ov nær.



*Suðuroyar Tjóðveldisfelag er nú av álvara farið at leggja trýst á løgtingsmannin hjá sær, Hergeir Nielsen*

Og tað er í sjúkrahúsmálinum og og málinum um oljuhavn í Suðuroynni.

Suðuroyar Tjóðveldisfelag hevur m.a. kravt, at samgongan finnur tann neyðuga peningin til at virksemið á Suðuroyar Sjúkrahúsi kann halda fram í ár á sama støði, sum í fjør.

Men felagið kravdi eisini, at tjóðveldisflokkurin tók undir við uppskotinum hjá javnaðarflokkinum um at leggja oljuhavn ú Suðuroy.

Suðuroyar Tjóðveldisfelag heldur, at Tjóðveldisflokkurin hevur handfarið málið um oljuhavn í Suðuroy sera jánkasliga og støðuleyst, sigur felagið í einum skrivi til tjóðveldisflokkin.

Tí krevur felagið, at flokkurin tekur undir við javnaðarflokkinum um oljuhavn í Suðuroynni.

Men letur tað seg ikki gera, krevur felagið, at flokkurin ger eitt nýtt uppskot, har alt oljuvirksemið, bæði fyristingin og útgerðarhavn v.m, verður lagt í Suðuroynni.

Leivur Nygaard, næstformaður í Suðuroyar Tjóðveldisfelag, sigur, at onki minni enn hetta vil felagið góðtaka.

Og hann leggur afturat, at felagið hevur gjørt flokkinum greitt, at verða krøvini ikki gingin á møti, er stuðulin bælði til løgtingsmannin, Hergeir Nielsen, og til samgonguna annars, í vanda.

Hann sigur, at støðan í Suðuroynni er sera álvarslig og at tað er avgerandi neyðugt at nýggjar vinnur koma í oynna. Og við oljuvinnuni hava tinglimir nú høvið til at rætta Suðuroynni eina hjálpandi hond, sigur Leivur Nygaard, næstformaður í Suðuroyar Tjóðveldisfelag.

## Eisini Jenis var fyri

Í umrøðuni í blaðnum í gjár um viðgerðina í løgtinginum um oljuhavn í Suðuroy, komu vit tíverri at gera Jenisi av Rana órætt.

Vit gloymdu nevniliga at nevna hann ímillum tey, sum atkvøddu fyri uppskotinum.

Men við hesum verður tað so staðfest, at Jenis av Rana var ein av teimum 11 løgtingslimunum, sum atkvøddu fyri at leggja oljuhavn í Suðuroynni.

*–Áki–*



# Føroyskir tónasmiðir á altjóða fløgu

*Føroyskir tónasmiðir koma nú út á fløgu hjá svenska felagnum BIS. Størsti marknaðurin er í Japan*

DAGFINN OLSEN

The Reykjavík Wind Quintet spældi í samstarvi við Tutl verk hjá føroyskum tónasmiðum, sum Tutl ætlaði at geva út.

Upptøkurnar eydnaðust so væl, at Quintettin metti, at roynt átti at verið at fingið svenska felagið BIS at geva út.

Svenska felagið hevur ivaleyst hildið tað sama, tí nú koma føroysku verkini út á fløgu, sum felagið gevur út.

Kristian Blak frá Tutl sigur, at sjálvsagt var tað keðiligt fyri Tutl, men spurningurin er, um tað ikki er so mikið betri fyri tónasmiðirnar, at teir hervið fáa ein góðan møguleika, tí tað er ikki so einfalt at fáa fótin fastan hjá feløgum, ið fáast við at geva út klassiskan tónleik.

Tað er hálvi føroyingurin Bernharður Wilkinson, sum leiðir orkestrið, og hann er fegin um úrslitið. The Reykjavík Wind Quintet spælir føroyska tónleikin og eisini spælir Guðríður Sigurðardóttir klaver.

Annars spæla Bernharður Wilkinson, Floyta, Daði Kolbeinsson, obo, Einar Jóhannesson, klarinett, Jósef Ognibene, horn og Hafstein Guðmundsson, bassun.

### Í japan

Føroysku tónasmiðirnir, ið eru umboðarðir á fløguni, eru Sunleif Rasmussen, føddur í 1961. Edvard Nyholm Debess, føddur 1960. Kári Bæk, føddur 1950. Kristian Blak, føddur 1947. Atli Petersen, føddur 1963. Pauli í Sandagerði, føddur 1963.

Fløgan við føroyska tónleikinum verður, við útgávuni hjá BIS, givin út um stóran part av heiminum. Størsti marknaðurin sigst vera í Japan.

H.C.W. Tórgarð er umboð hjá BIS í Føroyum.













# Ólag á telefonunum í Eysturoynni

*Orsøkin er, at 15.000 leidningar skullu skoytast í Fuglafirði*

DAGFINN OLSEN

Í vikuni hava telefonfelagar í Eysturoynni kent seg nervaðar av, at tá roynt hevur verið at fingið fatur í ávísum persóni ella virki, so hevur okkurt heilt annað tikið hornið í hinum endanum av tráðnum.

Sofus Nielsen frá Føroya Tele í Eysturoynni sigur, at frágreiðingin er einføld.

Tá lagt var um frá analogari skipan til digitala, skuldu allir leidningar hittast í Fuglafirði og krossast har.

Hesum hava teir arbeitt við nú í nakrar nætur. Síðstu nátt var síðsta stórarbeiði gjørt. Tá sótu 8 mans og arbeiddu við at krossa og sambinda 15.000 leidningar. Sofus Nielsen heldur, at ikki er løgið, um tað hendir, at onkur villa kemur í, men talan er bert um smærri villur, sum verða rættaðar skjótt. Hann leggur afturat, at lýst hevur verið við, at arbeitt verður uppá telenetið.

## Snirr og Strok

*Tað fyrsta í 2000 er komið*




Barnablaðið, ella Snirr og Strok, er komið. Tað fyrsta í ár 2000.

Alt eftir, frá hvørjari síðu ein lesur blaðið, kallast tað nú Snirr ella Strok. Hálvan, ið nevnist Snirr, er fyri tey smærru og Strok fyri størru børnini.

Andlitslyftingin, sum blaðið fekk, tykist hava eydnast væl og tilfarið um kendar stjørnur og heimligt tilfar, blandað við miðsíðumynd, ynskimynd, tykist vera væl mótikið.

